PAULINA M. K. ELIASEN

# Bundið turriklæð

## TIL FØROYSKA KVINNUBÚNAN



**Bundið turriklæð til Føroyska kvinnubúnan**

*Gjørt uppskrift hevur Paulina M. K. Eliasen*

Stødd: Miðal/Stór

***Uppskot til tógv:***

| | |
|---|---|
| Uppskot nr. 1 | 3 noðu av Leonora by Permin - 50% silki, 40% ull og 10% mohair |
| Uppskot nr. 2 | 3 noðu Isager Alpaca 1 (bundi við dupultum tráði) - Lamaull |
| Uppskot nr. 3 | 2 hespur Isager Alpaca 2 - Lamaull |

Stokkar 3 mm.

Hekklinál nr. 2 ella 2,5 mm

***Frágreiðing til holmynstur****: Rættan: Byrja altíð við at taka 1. eyga rætt leyst av á rættuni, (hetta telur fyri eitt rætt eyga) Rangan: Byrja altíð við at fyrsta eyga leyst rangt av. Tá trý eygu standa eftir annaðhvørt um*
*fær, 1. eyga leyst rangt av. (Byrja nú tað rætta umfari harfrá)*
*Fyrsta eyga leyst av, er fyri at fáa góðan kant at hekla í, tá liðugt er.*

**Byrja her:**

Kasta 74 eygu uppá.

**Holmynstur**

1. Umfar: Bind 2 eygu røtt og 2 eygu rang 68 eygu tilsamans, enda við at binda 6 eygu røtt = 74 eygu
2. Umfar: Tak 1. eyga leyst av og bind 5 eygu røtt, hetta er ein kantur inn mót hálsinum. Bind so tey 68 eyguni 2 røtt og 2 rang.
3. Umfar: Tak 1. eyga rætt leyst og bind 1 eyga rætt og 2 eygu rang = 4 eygu *slá um bind 2 eygu røtt saman og bind síðan 2 rang*, til tað eru 6 eygu eftir. Bind 3 eygu røtt, tá ið tað standa 3 eygu eftir vendir tú.
4. Umfar: Tak 1. eyga leyst av bind 2 eygu røtt, *síðani 2 eygu røtt og 2 rang* restina av stokkinum.
5. Umfar: Tak 1. eyga leyst rætt av og bind 1 eyga rætt og 2 eygu rang * 2 eygu røtt saman og slá um bind 2 eygu rang * bind til 6 eygu eru eftir og tey verða bundin røtt.

Bind so umfar 2,3,4 og 5 víðari, til tað er íalt 69 hol í teimum røttu eygunum.

Um tú ynskir tað eitt sindur størri so fleiri hol. Enda holmynstrið við 4. umfar.

**Miðjan:**

*Frágreiðing til miðjuna:*

*Miðjan verdur bundin við stiklavond, t.v.s. bindast rætt á báðum síðum. Byrja stiklavondini á rættini við at taka 1. eyga leyst av og binda eitt eyga rætt, og á ranguni endar umfari við at binda 2 rong eygu. Fyri at fáa góðan kant at hekla í seinni.*

Bind tveir stokkar rætt ,bind so trý eygu styttri upp hvørja ferð, vend og bind omanaftur.

Tá 5 eygu eru eftir, bind so 3 eygu meira hvørja ferð áðrenn tú vendir, bind so til 8 eygu eru eftir, og so 11 o. s. v.

Bind til tað aftur eru 74 eygu bundin. Bind so tveir stokkar rætt og nú bindur tú frá ranguni.

Nú byrjar mótsetta síðan og bind hol mynstrið aftur.

Tak fyrsta eyga leyst av, bind 5 eygu røtt. *2 røtt og 2 rang*.

Byrja so at binda hol mynstur.

**Hol mynstur, sí frágreiðing fyrr.**

Bind umfar nr, 3, 4, 5. og umfar nr. 2. Hald fram til tú hevur bundið 69 hol.

Tá ið tú hevur bundi 69 hol, bindur tú 1 umfar afturat. Tak 1. eyga leyst av 1 rætt eyga , 2 rang eygu ,síðani * 2 røtt og 2 rang* og so 6 eygu røtt.

Nú skalt tú læsa av á ranguni, rætt yvir røttum og rangt yvir rangu.

**Endarnir báðumegin.**

Tak 74 eygu upp á rættuni, tú mást ikki bara taka tey uppá, tey mugu bindast samstundis.

Næsti stokkur, bind 2 rang eygu saman allan vegin yvir = 37 eygu.

Bind nú 2 røtt og eitt rangt og tak **2 eygu saman mitt í**, so tað verða 36 eygu tilsaman enda við einum rangum eyga.

Tak nú 1. eyga leyst av og bind 2 rang* 1 rætt 2 rang*

Bind nú víðari, men byrja altíð við at taka 1 eyga leyst av og bind rætt yvir røttum og rangt yvir rangum. 4 stokkar afturat.

Íalt 6 stokkar.

Bind nú 2 røtt eygu saman og 1 rangt eyga = tilsamans 24 eygu.

Bind so 1 rætt 1 rangt , bind 22 cm og læs av.

Nú verður hin endin bundin líka. Minst til at taka eyguni upp á rættuni.

**Heklaður kantur upp í móti hálsinum.**

Heklaði kanturin er kanturin upp í móti hálsinum, tó ikki á enda stykkinum. Kanturin er heklaður á ræŧtuni.

*Rættan:* Hekla 1 fast eyga/fast masku í hvørt kant eyga har sum hol mynstri er, ikki har tú bindur rond (enda stykkini).

*Rættan:* Hekkla so krebsmaskur yvir aftur. T.v.s.fastmaskir, sum verður hekkla aftur eftir, sí youtube.

**Heklaður kantur niðast.**

Rættan: 1 fast eyga (fastmaska) 4 luftmaskur og so eina fastmasku í annaðhvørt eyga, so aftur 4 leys eygu (luftmaskur) og 1 fast eyga í annaðhvørt eyga allan vegin í niðasta kanti, og her verða so frynsar koyrdir í.

Heft endar.

**Frynsar.**

Klipp eitt papp 25 cm, og umleið 15 cm breitt, legg tað í helvt, so tað er 12,5 cm.

Vind tógvi um pappi. Síðan damp strúkur tú á í báðum síðum. Klipp tógvi har í ó foldaði endanum.

Brúka

- (3) Leonora by Perming endar til hvønn frynsin ella
- (6) Isager Alpaca 1 endar til hvønn frynsin ella
- (4) Isager Alpaca 2 endar til hvønn frynsin

alt eftir hvat tógv tú hevur bundið við og koyr frynsar í allar bogarnar niðast.

Greið frynsarnar, og klipp teir til.

Vaska tað í hond flógvum vatni, sum tað stendur skriva á tóvnum, turka tað við at leggja tað áeitt baði handklæð, og forma tað á tí, og greið frynsarnar.

**GG!!! Tað má ikki hangast upp at turka**

So er turriklæðið klárt at fara í.





PAULINA M. K. ELIASEN

# Bundið turriklæð

TIL FØROYSKA KVINNUBÚNAN



